# Til minnis um mína elskaðu mammu Sølvu á Gerðisbakka

Ja mamma, so fekst tú endiliga frið. Aldrin hoyrdi eg teg klaga yvir, at tað var tú sum skuldi gjøgnumganga so nógv. Var tú spurd "Mamma, er tað ikki keðiligt, at vera so sjúk"? Var svarið altíð tað sama "Nei, eg fái ikki meira á mínar herðar enn eg kann bera"



Fyri teg vóru vit børn og ommubørn alt, tú var tann sum helt okkum saman, men aldrin við at siga " Nú skulu vit halda saman" Tú var bara okkara samlingspunkt, líkamikið hvat. Aftaná at pápi doyði í 1976, var tú tann sum var sterk og helt okkum saman. Nú sum vaksin havi eg fingið fortalt, hvussu trupult tú hevði tað, við at skaffa mat, klæðir og annað til okkum børn, tí tú var jú einsamøll við okkum 8 børnum, sum bara vóru frá 5 til 16 ára gomul. Men, eg haldi ikki eg fari skeiv, tá eg sigi, at fáur man hava hoyrt teg klaga um, at onki var at liva av, tú bardist bara víðari, tí tað skuldi nokk ganga og tað gekk eisini, men uttan teg hevði tað aldrin gingið.

Besta avgerð eg nakrantíð havi tikið í lívi mínum, var at flyta til Danmarkar at vera um teg. Tú gav mær eitt heilt annað innlit í lívið. Tú vísti mær, at vit sum eru frísk, ofta grenja um ting sum onki hava við góðsku í lívinum at gera, vit skeldast yvir smáting, ístaðin fyri at gleðast yvir næstan onki. Mamm, tú vísti mær hvat lívið er vert, og at vit skulu seta prís á tí gávu vit hava fingið.

Fyrstu tíðina vit høvdu saman her í Esbjerg, var tú ikki so sjúk, so tá fingu vit snakka nógv saman. Tú var altíð glað og kom mangan við stuttligum viðmerkingum. Næstan hvørt kvøld tá eg kom heim, hevði eg okkurt stuttligt at fortelja, sum tú hevði sagt.

Nú aftaná tú er farin til ein betri stað, hoyri eg ofta orð tíni....Ikke være ked af det, det hele skal nok gå! Soleiðis var tú allan vegin ígjøgnum, stuðlaði øllum í neyðini. Hjálpti har tú kundi, aldrin hoyrdi man teg siga nakað um, at tú hevði hjálpt. Tú var bara tann sum hjálpti.

Sjálvt nú, tá tú føldi, at tín tíð lækkaði ímóti endanum, var tú tann sum var sterkast. Tú tók sjálv avgerðina um at steðga allari viðgerð, men tað var ikki uttan at kempa, at tú tók tað valið. At síggja hvussu tú spakuliga bleiv sjúkari og sjúkari, tók nógv uppá okkum avvarandi. Eg minnist so tíðuliga tann dagin læknin hevði tosað við teg um, at vinstra bein skuldi takast. Tá eg spurdi teg hvat tú helt um tað, svaraði tú bara "Man tað ikki vera í lagi? Ella hvat heldur tú?" Tá eg spurgdi teg um tú ikki var bangin, svaraði tú klárt "Nei, hvat er at vera bangin fyri?"

Ein ting tú elskaði nú seinasta hálva árið var at eg sang fyri tær. Tann sangin tú sum oftast vildi hoyra var hjá John Denver "Annies song". Tann sangurin passar væl til tín mamma.

Eitt vigtugt sum tú lærdi meg tí seinastu vikuna var, er at deyðin er ikki nakað man skal vera bangin fyri. Takk fyri alt og æra verið minnið um mammu mína Sølvu.

**Sunnleyg.**

## Andlát og jarðarferðir

Torkil Mortensen, ættaður av Tvøroyri búsitandi í Nærum, andaðist fríggjadagin 30. juni, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Søllerød kirkju hós–dagin kl. 12.

Sverri Eidesgaard úr Oyndarfirði, búsitandi í Keypmannahavn, and–aðist fríggjadagin 30. juni, 80 ára gamal.

---

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæri maður mín

**Torkil Mortensen**
ættaður av Tvøroyri, búsitandi í Nærum

andaðist fríggjadagin 30. juni, 71 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Søllerød kirkju
hósdagin kl. 12.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Birthe**

---

Handilsskúlin á Kambsdali:

# Fyrstu fjarlestrarnæmingarnir lidnir

Fríggjadagin fingu fyrstu fjarlestrarnæmingarnir FHS prógv. Seinastu tvey árini hevur Handilsskúl–in á Kambsdali skipað fyri FHS stakgreinalestri sum fjarlestur, og tríggir næmingar hava fylgt øllum lærugreinunum og staðið tær og harvið tikið fult FHS prógv. Tað eru Ame–rada Hess, BP Amoco, Innlendismálaráðið og Mentamálaráðið, ið hava stuðla lestrinum. Undirtøkan hevur verið somikið góð, at avgjørt er at halda á–fram. Í heyst byrja nýggir flokkar í kunningartøkni og virkisbúskapi.



*Fyrstu fjarlestrarnæmingarnir, ið hava tikið fult FHS-prógv eru: Saroya Britt Dalsgarð og Jensia Niclassen. Á myndini vantar Winnie Vestergaard*

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Petur Djurhuus**
Tórshavn, ættaður av Nesi, Vági

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk til talarar, sangarar og spælarar.
Tøkk fyri minnisgávur til Zarepta.
Tøkk til tykkum, sum sendu blómur og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her.

*Vegna tey avvarðandi*
**Karin, Lis og Eyðvør**